# Minningargrunnur

## Dánjal Niclasen's

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2006 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's eiga at verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin, hin 10. august 2006.

Umsóknarblað fæst við at fara á heimasíðuna www.faroe.com ella heimasíðuna www.united.fo ella seta seg í samband við Faroe Seafood, tel. 35 55 55. Umsóknarblaðið skal sendast til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen's:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen's**
**c/o Faroe Seafood**
**Postboks 68**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Meinhard Jacobsen, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær **víðari útbúgving** innanfyri føroyska fiskivinnu. Í 2006 verða umsóknir um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's raðfestar á henda hátt:*

- *Serútbúgving í handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*
- *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
- *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
- *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*

Sosialurin 341800

# Røktarheimið á Mørkini Streymnes

## Hjálparfólk til klædnavask og viðlíkahald av klæðum

Søkt verður eftir hjálparfólki til at vaska og viðlíkahalda klæðini hjá bú- og starvsfólkinum á Røktarheiminum á Mørkini at arbeiða 30 tímar um vikuna.

**Vit sóknast eftir fólki sum:**
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Ert røkin
- Dugir at seyma/viðlíkahalda klæðir
- Dugir at samstarva og samskifta
- Hevur gleði í at arbeiða við gomlum fólki

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður at seta 1.september 2006 ella skjótast tilber og verður lønt eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara á tlf. 333249/471050. Setanarstaður er Heimarøktin og Serforsorgin.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við møguligum prógvi og viðmælum verður at senda til:

**Røktarheimið á Mørkini**
435 Streymnes

**Umsóknarfreist:** 22. august 2006.




## "Enniberg"

Útferð til Enniberg hvønn dag kl. 15:00. (Vit sigla um bert *ein* møtir upp).
max. 25 ferðafólk.
Kostn. 250 kr./fólk.
Túralongd 2½ tími.

Ring: m/b Alpha Pilot
Telefon 220849

Sosialurin
www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

# Sølufólk

Søkt verður eftir sølufólki – kvinnu ella manni til timburdeildina hjá Sandavágs Timburhandli. Sandavágs Timburhandil er ein timburhandil í stórari menning. Timburhandilin er nú eisini farin at smíða lyklaklár hús og veita heildartænastur til kundan. Til hetta endamál søkja vit eftir fólki, ið kann standa á egnum beinum og taka sjálvstøðugar avgerðir. Tað er umráðandi at viðkomandi persónur eisini kann vera við til at menna konseptið.

**Arbeiðið umfatar:**
- Sølu av lyklaklárum húsum
- Søla av tilfari til sethús, ídnaðarbygningar o.t.
- Marknaðarføring av Sandavágs Timburhandli
- Tilboð
- Innkeyp
- Strutttíðar eins og langtíðar tilrættislegging »Strategi«

Vit bjóða eitt spennandi umhvørvi, eitt starv, sum er sera fjølbroytt, eitt starv, har ein sjálvur kemur til at tilrættisleggja sín dagligdag. Harafturat hava kontór okkara allarhelst Føroya besta útsýni.

Lønin verður at avtala.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi áðrenn 5. september 2006.

**P/f Sandavágs Timburhandil**
Hillingatangi 8-12
FO-360 Sandavágur

Att: Albert Ari.

Um spurningar eru, kann ringjast á tlf. 533053.

# HANDILSLÆRLINGUR TIL THOMAS DAM ÍTRÓTT Í HAVN

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara í Havn at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og vi FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR · NIELS FINSENSGØTA 5
POSTSMOGA 268 · 110 TÓRSHAVN · TEL 35 53 00



# Vinnari av málninginum

Lions Club Tórshavn skipaði aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku, og framsýningarskráin var samstundis lutaseðil, har vinningurin var ein málningur hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra.
**Vinnarin gjørdist skrá nr. 150**, og eigarin av henni kann seta seg í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 210299.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**